ítróttur

Nr. 36 • hósdagur • 21. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Skeivt nummar

Í samband við uppvísingardystin, sum Neistin skipar fyri í kvøld, hóskvøldið, skulu vit siga frá, at í greinini um hendan í týsdagsblaðnum, var kontonummarið í peningastovunum komið skeivt fyri.

Tey, sum vilja stuðla tiltakinum við eini peningagávu, skulu seta peningin á hesa konto. 9181-134.457.0.

- jm

StÍF–Stjørnan 18-20 (6-8)

Stjørnan reistist

Eftir javnleikin um vikuskiftið móti Kyndli reistist Stjørnan aftur týskvøldið, tá tað eydnaðist at vinna ein tepran sigur á botnliðnum StÍF. Serliga útlendingarnir settu dám á dystin

HONDBÓLTUR
Stefan í Skorini

Stjørnan greiddi sína skyldu, tá klaksvíkskvinnur møttu StÍF á Skála. Favorittarnir úr Klaksvík vunnu 20-18, eftir at tær høvdu verið frammanfyri 8-6 við steðgin.

Við sigrinum fer Stjørnan framvið Neistanum á stigatalvuni. Tær hava sostatt endurvunnið annað pláss, sum tær mistu til Neistan eftir javnleikin um vikuskiftið. Stjørnan liggur nú til at endurvinna silvurið frá í fjor.

Javnur dystur

Tað leikti javnt á allan dystin, og StÍF gav Stjørnuni harða mótstøðu allan vegin. Stjørnan hevði annars munin fyri steðgin í einum sera málfátækum fyrra hálvleiki.

Stjørnan fekk eina vánaliga byrjan, har tær bara megna at skora eitt mál tað fyrsta korterið, men síðani vendi liðið gongdini.

Andrijana Milodanovic var sera væl uppløgd týskvøldið. Hon skeyt helmingin av málunum hjá Stjørnuni fyri steðgin, tá kvinnurnar úr Klaksvík fórdu við tveimum.

Eftir steðgin royndi heimaliðið at bíta frá sær, men hóast dysturin var javnur, megnaðu tær ongantíð at koma framum gestirnar.

Tað vóru serliga útlendingarnir, ið gjørdu nógv um seg í dystinum. Hjá Stjørnuni vóru Andrijana Milodanovic og Simona Dziugyte toppskjúttar, og hjá StÍF vóru tað Alina Olaru og Ileana Manolescu, ið skutu flest mál.

Annars verður sagt um dystin, at hann var illa spældur við nógvum mistøkum. Hevði StÍF verið neyvari í sínum royndum á málið, kundi úrslitið verið eitt annað, tí heimaliðið brendi fleiri møguleikar enn Stjørnan, hvørs málmaður stóð ein góðan dyst.

Beinleiðis av flogvøllinum

Joan M. Joensen var ikki við í seinasta dystinum móti Kyndli, tí hon var í Danmark. Hon kom aftur til Føroyar týsdagin, og hon legði leiðina beinleiðis inn á Skála, har hon spældi seinastu fimtan minuttirnar.

Og tað kann sigast, at hon var við til at avgera dystin. Hesar fáu minuttirnar skeyt hon trý mál og hevði eisini nakrar frískælingar.

Venjarin Geir Wardum sigur, at liðið bara hevur tveir veruligar skjúttar, og teir eru Simona og Joan. Tí liggur eitt størri trýst á Simonu, tá Joan ikki er við.

Hann hevur annars góðar vónir um, at Stjørnan kann halda fast um silvurmerkini. Liðið úr Klaksvík hevur annars heilt nógvar skaðar at dragast við í løtuni. Andrijana hevur trupulleikar við knænum, og Simona Dziugyte skal leggjast undir skurð, tá kappingin er liðug. Hon hevur oyðilagt sær eitt liðband í tumlinum. Fleiri aðrar hava eisini skaðar.

Stjørnan liggur nú aftur á øðrum plássi, men Neistin er bara eitt stig aftanfyri, og tí verður dysturin um silvurið sera spennandi.

Stjørnan reistist aftur eftir javnleikin seinasta vikuskiftið. Tær vunnu ein tepran sigur á StÍF

Mynd: Álvur Haraldsen

Dysturin í tølum:

StÍF – Kyndil 18-20 (6-8)

Málskjúttar:
StÍF: Alina Olaru 7, Ileana Manolescu 6(2), Sunfríð B. Jacobsen 2(1), Poula D. Olsen 1, Guðrun Ólavsdóttir 1, Anna Maria Bertelsen 1
Stjørnan: Andrijana Milodanovic 7, Simona Dziugyte 5(2), Anna Kristina Samson 3, Joan M. Joensen 3, Ragna Andreasen 1, Una Olsen 1
Brotskøst: StÍF 3, Stjørnan 2
Útvísingar: StÍF 1, Stjørnan 5
Dómarar: Uni Wardum & Hannis Wardum

StÍF – KÍF 24-28 (10-13)

KÍF fekk fyrsta sigurin

Kollfirðingar fingu fyrsta sigurin í endaspælinum, tá botnliðið vann heldur óvæntað á steypavinnarunum av Strondum

HONDBÓLTUR
Stefan í Skorini

Eingin ivi var um, hvat av liðunum var meira uppsett at vinna dystin. Kollfirðingar stríddust betri allatíðina og høvdu eisini sigurin uppibornan.

Hetta var tann fyrsti sigurin í endaspælinum, og tað er kanska løgið, at hann skuldi koma júst á Skála móti einum at frægaru liðunum í deildini.

KÍF førdi við trimum málum við steðgin, og útiliðið megnaði at halda tørn í seinna hálvleiki, hóasta strandingar allatíðina vóru nær við at fáa kollfirðingar aftur.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki tók málverjin hjá KÍF tvey brotskøst innanfyri tveir minuttir, og hetta var við til at geva KÍF sjálvsálit og dirvi at koyra sigurin heim.

Sigurin er ógvuliga avgerandi fyri KÍF, sum stríðist í botninum. Við sigrinum hava teir givið sær sjálvum ein góðan møguleika at sleppa av aftasta plássinum.

StÍF hinvegin hevug vunnið steypakappingina og hevur at kalla tryggjað sær bronsuna. Tí er ikki so nógv at spæla fyri hjá strandingum meira.

Dysturin í tølum:

Málskjúttar:
StÍF: Sveinur Justinussen 7(2,) Andre F. Danielsen 7, Costin Dumitrescu 5(3), Artur Johansen 3, Marius Joensen 2
KÍF: Iljan Topic 7, Durica Tomic 6(2), Eddie Joensen 4, Jákup Dam 4, Petur M. Poulsen 2, Vagnur Johannesen, Regin Petersen 2, Finn Heri Johannesen 1
Brotskøst: StÍF 7, KÍF 5
Útvísingar: StÍF 3, KÍF 2
Dómarar: Uni Wardum & Hannis Wardum

Andre F. Danielsen var toppskjútti hjá StÍF við sjey málum, men KÍF vann kortini dystin. Hetta var fyrsti sigurin hjá kollfirðingum í endaspælinum

Mynd: Álvur Haraldsen

HS-kapping

Í vikuskiftinum 15. og 16. februar var svimjistevna í Havn. Stevnan var úttøkukapping til DKM (Dansk Kortbane Mesterskab), sum verður í Nærum, Danmark í døgunum 21. til 24. mars. Tríggir svimjarar hava nú klárað kravtíðir til hesa kapping:

Jóannes á Fløtti í 50 m ryggsvimjing
Andrass Thomsen í 800 m frísvimjing
Elisabeth Rasmussen í 50 m bringusvimjing

Úrslit menn

	Árg.	Felag	Tíð
50 m frí			
Kristoffur Hentze	82	HS	00.25.67
Aksal Norðfoss	87	HS	00.27.76
Bárður Klein	86	HS	00.28.69
100 m frí			
Kristoffur Hentze	82	HS	00.56.45
Mourits Danberg	83	HS	00.59.38
Jón Absalonsen	87	HS	00.59.90
200 m frí			
Mourits Danberg	83	HS	02.09.80
Janus Olsen	86	HS	02.13.40
Jón Absalonsen	87	HS	02.13.86
400 m frí			
Andrass Thomsen	82	HS	04.20.90
Jóannes á Fløtti	84	HS	04.31.04
Bárður Klein	86	HS	05.03.50
800 m frí			
Andrass Thomsen	82	HS	09.02.56
Jóannes á Fløtti	84	HS	09.26.23
Jákup Mohr	89	FS	11.05.50
50 m rygg			
Andrass Thomsen	82	HS	00.30.42
Bogi Lenvig	81	HS	00.30.65
Janus Olsen	86	HS	00.31.60
100 m rygg			
Andrass Thomsen	82	HS	01.04.37
Jóannes á Fløtti	84	HS	01.04.75
Ari av Rana	87	HS	01.16.22
200 m rygg			
Andrass Thomsen	82	HS	02.18.61
Jóannes á Fløtti	84	HS	02.18.68
Ari av Rana	87	HS	02.44.68
50 m firvald			
Bogi Lenvig	81	HS	00.29.07
Jón Absalonsen	87	HS	00.30.29
Mourits Danberg	83	HS	00.30.34
100 m firvald			
Bogi Lenvig	81	HS	01.06.89
Jón Absalonsen	87	HS	01.07.17
Beinir Danielsen	88	FLOT	01.23.81
50 m bringu			
Kristoffur Hentze	82	HS	00.33.69
Niclas Olsen	82	HS	00.35.62
Aksal Norðfoss	87	HS	00.38.06
100 m bringu			
Niclas Olsen	82	HS	01.19.54
Aksal Norðfoss	87	HS	01.22.10
Per Hansen	88	FLOT	01.24.13
200 m bringu			
Aksal Norðfoss	87	HS	03.02.00
Per Hansen	88	FLOT	03.06.61
100 m blandað			
Kristoffur Hentze	82	HS	01.04.37
Bogi Lenvig	81	HS	01.07.29
Mourits Danberg	83	HS	01.08.23
200 m blandað			
Mourits Danberg	83	HS	02.36.64
Beinir Danielsen	88	FLOT	02.48.12
Jákup Mohr	89	FS	02.54.12
400 m blandað			
Andrass Thomsen	82	HS	04.55.54
Jóannes á Fløtti	84	HS	05.09.40

Úrslit kvinnur

50 m frí			
Elisabeth Rasmussen	86	HS	00.29.74
Karina Petersen	80	FS	00.32.11
Randi Jacobsen	89	HS	00.33.23
100 m frí			
Lisbeth Joensen	87	HS	01.08.01
Randi Jacobsen	89	HS	01.14.47
Sonya á Argjagarði	89	HS	01.14.47
200 m frí			
Helga Djurhuus	89	HS	02.23.86
Lisbeth Joensen	87	HS	02.24.75
Karina Petersen	80	FS	02.30.74
400 m frí			
Helga Djurhuus	89	HS	05.10.74
50 m rygg			
Katrin Sørensen	82	HS	00.34.42
Rannvá Jacobsen	82	HS	00.34.60
Karina Petersen	80	FS	00.35.28
100 m rygg			
Rannvá Jacobsen	82	HS	01.14.05
Katrin Sørensen	82	HS	01.15.40
Karina Petersen	80	FS	01.15.79
200 m rygg			
Karina Petersen	80	FS	02.45.53
Halla Reinert	86	HS	03.07.91
Henny Abrahamsen	87	FS	03.09.44
50 m firvald			
Helga Djurhuus	89	HS	00.33.71
Lisbeth Joensen	87	HS	00.33.88
Karina Petersen	80	FS	00.35.92
100 m firvald			
Helga Djurhuus	89	HS	01.16.27
50 m bringu			
Elisabeth Rasmussen	86	HS	00.36.47
Karina Petersen	80	FS	00.38.54
Silja Strøm	87	HS	00.41.62
100 m bringu			
Elisabeth Rasmussen	86	HS	01.22.15
Karina Petersen	80	FS	01.26.86
Silja Strøm	87	HS	01.29.54
200 m bringu			
Karina Petersen	80	FS	02.59.25
Elisabeth Rasmussen	86	HS	02.59.88
Silja Strøm	87	HS	03.14.33
100 m blandað			
Karina Petersen	80	FS	01.16.28
Helga Djurhuus	89	HS	01.18.72
Guðrun Magnussen	88	HS	01.23.92
200 m blandað			
Karina Petersen	80	FS	02.44.46
400 m blandað			
Karina Petersen	80	FS	05.48.36

Savnsmynd

Hondboltsstøður

1. Deild kvinnur

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	6	6 - 0 - 0	536	312	224	24
2	Stjørnan	7	4 - 1 - 2	474	393	81	18
3	Neistin	7	4 - 1 - 2	421	371	50	17
4	VB	6	4 - 1 - 1	417	416	1	15
5	StÍF	6	2 - 0 - 4	339	422	-83	5
6	Kyndil	7	0 - 1 - 6	426	508	-82	4
7	Sóljan	7	1 - 0 - 6	345	536	-191	4

1. Deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	6	6 - 0 - 0	532	442	90	23
2	Neistin	6	4 - 0 - 2	559	473	86	18
3	StÍF	6	4 - 0 - 2	494	482	12	14
4	Kyndil	7	3 - 1 - 3	448	492	-44	9
5	H71	6	0 - 2 - 4	497	534	-37	8
6	Tjaldur	6	2 - 0 - 4	455	511	-56	8
7	KÍF	7	1 - 1 - 5	497	548	-51	7

VÍF – Sóljan 37-15 (18-6)

Lættur sigur

VÍF hevði lætt spæl móti Sóljuni í høllini í Vestmanna. Munurin var heili 22 mál tá avtornaði

HONDBÓLTUR
Stefan í Skorini

VÍF hevur vunnið meistaraheitið. Kvinnurnar úr Vestmanna liggja nú so langt frammanfyri hini liðini, at eingin tekur tær.

Týskvøldið var kvinnuliðið úr Vágunum á vitjan, og VÍF vísti teimum, hvussu hondbóltur skal spælast.

Longu við steðgin fordi heimaliðið við tólv málum, og hesin munur in bara vaks. VÍF hevur verið í einum flokki fyri seg í ár, og tað vístu tær aftur hesuferð.

Dysturin í tølum:

VÍF: Ioana Rapa 11(2), Sóleyð Mikkelsen 6(2), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 6, Jacklin Durhuus 6, Nicoleta Radu 5, Randi Kúrberg 2, Alis Høghamar 1
Sóljan: Asta Petrauskiene 9, Hertha Simonsen 3, Jana Jacobsen 2, Petra Thomassen 1
Brotskøst: VÍF 6, Sóljan 1
Útvísingar: Sóljan 3
Dómarar: Rúni Mohr og Eyðun Samuelsen